TALGILDU FØROYAR
01100110 01101111

# Útboð eftir mennarum til Virkisskránna í Talgildu Føroyum

Í samsvari við ásetingar um alment innkeyp, vilja Talgildu Føroyar, sum partur av Gjaldstovuni, hervið savna inn tilboð um tveir mennarar til komandi føroysku virkisskránna.

## Ein føroysk virkisskrá

Ein av høvuðstættunum í Talgildu Føroyum er grundardátur. Hetta er grundleggjandi dátur um Føroyar og føroyingar, sum skulu verða tøkar, álítandi og ókeypis. Í Føroyum er eingin eintýdd føroysk skrá, sum eyðmerkir føroyskar fyritøkur og virkiseindir sum heild (felagsskapir, almennar stovnar o.s.fr), tað sum eisini verður kallað løgfrøðiligar eindir. TAKS og Skráseting Føroya umsita ymsar upplýsingar, men neyðugt er at menna eina skrá, sum inniheldur allar grundleggjandi upplýsingar um fyritøkur og aðrar løgfrøðiligar eindir.

Eitt einmælt Løgting samtykti á sumri 2018 lóg um at seta á stovn eina almenna føroyska virkisskrá. Nú skal skráin gerast veruleiki, og farið verður undir menning í heyst.

Virkisskráin kemur at hava stóran týdning í Føroyum. Tað verður alment gjøgnumskygni um vinnuni, um tað almenna, og um aðrar virkiseindir. Alment innlit verður í mun til vinnugrein, staðseting, ábyrgdarpersónar, eigaraviðurskifti o.s.fr.

Harumframt verður tað lættari at stovna nýtt virki og at dagføra upplýsingar um virki. Hetta skal kunna gerast á einum stað. Almenna fyrisitingin á økinum verður betri samansjóðað, og tað verður lættari hjá almennu fyrisitingini at lúka altjóða krøv um gjøgnumskygni í mun til eigaraviðurskifti v.m.

Tað er Gjaldstovan, sum kemur at reka skránna, meðan Skráseting Føroya, TAKS og Hagstova Føroya verða skrásetingarmyndugleikar. Skráseting Føroya tekur sær av kapitalfeløgunum, t.e..partafeløgunum, smápartafeløgum o.s.fr., meðan TAKS tekur sær av felagsskapum, einstaklingavirkjum o.s.fr. Hagstovan hevur viðlíkahaldsábyrgdina fyri tað almenna.

Verkætlanin er fyrsta stóra stig at fremja ein føroyskan virkisvanga, har fyritøkur, felagsskapir o.s.fr. kunnu avgreiða síni viðurskifti við sjálvavgreiðslu og samskifti við almennar virkisvendar tænastuveitarar.

## Talgildu Føroyar standa fyri verkætlanini

Arbeitt verður í tøttum samstarvi við Skráseting Føroya, TAKS, Hagstovuna og Gjaldstovuna, sum mynda mátan skráin verður skipað.

Outsystems verður tøkniligi pallurin handan Virkisskránna. Hetta er eisini pallurin, sum Vangin er bygdur á.

Verkætlanargongdin verður *agil,* og arbeiðið er í tráð við meginreglurnar úr SCRUM. Arbeitt verður í sprintum við støði í sokallaða *”backlogginum”*.

Verkætlanarluttakarar vera serfrøðingar innan Outsystems, sum standa fyri arkitekturi, sprintætlan og førleikamenning, UX starvsfólk og testarar og teir mennararnir, sum leitað verður eftir í hesum útboði. Verkætlanin fær breiðan styrk úr serfrøðini hjá Talgildu Føroyum í KT arkitekturi, løgfrøði, kunning o.s.fr. Fakliga innihaldið og tørvurin, sum skráin skal lúka, verður tryggjað við luttøkuni av Skráseting Føroya, TAKS, Hagstovuni og Gjaldstovuni.

Uppgávan hjá mennarunum er at menna ymsu funktiónirnar í skránni. Í agilu tilgongdini verða partarnir skipaðir í ”sprints”, og mennararnir hava eina arbeiðsskrá í ”backlog”

### Kravfestingin er gjørd

Verkætlanin er kravfest í User Stories. Talan er um umleið 160 User Stories. Kravfestingin er í tveimum høvuðsskjølum og fylgiskjølum.

Tilboðsgevari fær atgongd til kravfestingina við at venda sær til Talgildu Føroyar.

## Sáttmáli og karmar

Sáttmáli verður gjørdur við eitt felag ella samtak, sum skal bjóða fram 1-2 navngivnar mennarar. Gjaldstovan tilskilar sær rætt at velja tveir teir bestu mennararnar, eisini um hesir koma frá ymsum tilboðsveitarum.

Byrjað verður fyrst í september 2021.

Talan er um arbeiði fulla tíð frá byrjanini av verkætlanini til verkætlanin er liðug. Verkætlanin er mett at vera liðug við árslok 2022.

Mennarin verður tímaløntur fyri sítt arbeiði sambært tímaprísinum, ið er ásett í vinnandi tilboðnum.

Tað er verkætlanarleiðarin fyri Virkisskránna, ið áleggur mennarunum tær uppgávur, ið skulu fremjast og mennararnir koma í hesum sambandi at virka sum innanhýsis luttakarar í verkætlanini.

Teir mennarar, sum felagið ella samtakið, ið vinnur útboðið, setur á hesa uppgávu, skulu sum útgangsstøði ikki skiftast út. Vísir tað seg, at samstarvið ikki er nøktandi, tilskilar Gjaldstovan sær rættin at skifta annan  ella báðar mennararnar út.

Gjaldstovan ger uppskot til sáttmála við vinnandi felagið ella samtakið.

## Arbeiðsstaður

Arbeiðsstaðurin er Gjaldstovan, Albert Hall á Argjum. Arbeiðsviðurskiftini eru annars liðilig, har høvuðsdenturin verður lagdur á at røkka góðum menningarúrslitum.

# Førleikakrøv og vekting av tilboðnum

Innkomnu tilboðini verða vektað eftir: Góðsku (royndir, førleikar og útbúgving), prísi og støðið á úrsliti av Outsystems uppgávu.

Hvør mennari verður vektaður hvør sær, eisini um eitt felag ella samtak hevur fleiri mennarar.

| Krav | Vekt | Frágreiðing |
|---|---|---|
| **Prísur** | **50 %** | |
| Tímaprísur | | |
| **Góðska** | **40 %** | |
| Útbúgving | | Tað verður vektað positivt, um mennarin hevur hægri útbúgving innan KT, ella annað viðkomandi fakøki. |
| Royndir, førleikar | | Tað verður vektað positivt, um mennarin hevur:<br>- Hollar royndir sum mennari seinastu 3 árini, helst sum mennari á høgum stigi.<br>- Góða fatan av dátugrunnum og myndlum um dátugrunnar og førleikar at byggja dátugrunnar.<br>- Dugir væl at menna forsíður (frontend), gott innlit í CSS og HTML.<br>- Verkligar royndir við Java Script.<br>- Royndir at menna í .Net.<br>- Innlit í KT arkitektur og í uppgávuni at sniðgeva KT skipanir.<br>- Royndir at arbeiða við Rest API og um vevtænastu-tøkni (web-services) sum heild.<br>- Royndir í automatiskum testmannagongdum.<br>- Prógv sum “Outsystems Associate Reactive Developer certificate”.<br>- Mennararnir hava staðið hesi skeið:<br>    o https://www.outsystems.com/learn/paths/2/becoming-a-traditional-web-developer/<br>    o https://www.outsystems.com/learn/paths/18/becoming-a-reactive-web-developer/<br>- Mennararnir hava kunnleika um hetta niðanfyri:<br>    o https://success.outsystems.com/Documentation/Best_Practices/Development/OutSystems_Platform_Best_Practices<br>    o https://success.outsystems.com/Documentation/Best_Practices/Development/OutSystems_Mobile_Best_Practices<br>    o https://success.outsystems.com/Documentation/Best_Practices/Development/Front-End_Architecture_Best_Practices<br>    o https://success.outsystems.com/Documentation/Best_Practices/Development/Building_Dynamic_SQL_Statements_the_Right_Way<br>    o https://success.outsystems.com/Documentation/Best_Practices/Development/The_Complete_Guide_to_Creating_Components |

| | | |
|---|---|---|
| **Outsystems uppgáva** | **10 %** | |
| | | Fyri at meta nærri um førleikarnar, skulu mennarar loysa eina uppgávu í OutSystems. Talan er um at gera eina einfalda bókingarloysn. Skjalfestingin av uppgávuni er upprunaliga gjørd í mun til siðbundið “Web”. Avbjóðingin her er at loysa uppgávuna við at nýta “Reactive Web”. Endamálið er at royna førleikar í mun til “Reactive Web”, at vita um mennararnir skilja grundarlagið undir Reactive Web, og um mennararnir eru førir at nýta Outsystems tøkni.<br><br>Veitarar ið ynskja at bjóða seg fram til hetta útboð, verða bidnir at venda sær til Talgildu Føroyar, at fáa nærri upplýsingar um, hvussu henda uppgáva skal loysast. |

**Útrokningin fer fram á henda hátt:**

Tímaprísur

Mennarin við lægsta tímaprísi fær 50 stig.
Hinir mennararnir fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli:
*Lægsti tímaprísurin býtt við tímaprísinum hjá mennara, sum verður mettur x 50*

Lægsti tímaprísurin í frymlinum kann aldrin verða lægri enn 600 kr., t.e. at bjóðar ein veitari ein tímaprísi lægri enn 600 kr., verður tímaprísurin ásettur til 600 kr. í vektingini.

Førleikar, útbúgving og royndir hjá ráðgevum:

Út frá eini samlaðari meting, út frá førleikum, útbúgving og royndum hjá mennarunum, verður eitt stigatal á einum skala frá 1-40 givið, har 40 er hægsta stigatalið.

Outsystems uppgáva

Út frá einari samlaðari meting av, hvussu væl mennarin hevur loyst Outsystems uppgávuna verður eitt stigatal á einum stiga frá 1-10, har 10 er hægsta stigatal.

**Dømi um útrokning:**

*Prísur*

Tilboð 1: Tilboðið við lægsta tímaprísi hjá veitaranum er 600 kr. Hetta gevur 50 stig.

Tilboð 2: Næstlægsta tilboðið er 750 kr. Hetta gevur 600/750 x 50 = 40 stig.

Tilboð 3: Triðlægsta tilboðið er 900 kr. Hetta gevur 600/900 x 50 = 33,3 stig.

*Góðska*

Tilboð 1: Hesin mennarin skorar lægst, tí mennarin hevur fáar og ikki so viðkomandi royndir og førleikar og ikki viðkomandi útbúgving. **Hesin fær 20 stig**.

Tilboð 2: Hesin mennarin skorar miðal, tí royndir, førleikar og útbúgving er á einum miðalgóðum stigi. **Hesin fær 30 stig**.

Tilboð 3: Hesin mennarin skorar hægst, tí mennarin hevur tær bestu og drúgvastu royndirnar, førleikarnir og útbúgvingina. **Hesin fær 40 stig**.

*Outsystems uppgáva*

Tilboð 1: Hesin mennarin skorar lægst, tí mennarin hevur ikki loyst Outsystem uppgávuna á nøktandi støði. **Hesin fær 2 stig**.

Tilboð 2: Hesin mennarin skorar miðal, tí mennarin hevur loyst Outsystem uppgávuna á nøktandi støði. **Hesin fær 5 stig**.

Tilboð 3: Hesin mennarin skorar hægst, tí mennarin hevur loyst Outsystem uppgávuna á høgum støði. **Hesin fær 10 stig**.

Samlað meting

Tilboð 1: Tímaprís 50 stig + førleikar 20 stig + uppgáva 2 stig = samlað meting á 72 stig.

Tilboð 2: Tímaprís 40 stig + førleikar 30 stig + uppgáva 5 stig = samlað meting á 75 stig.

Tilboð 3: Tímaprís 33,3 stig + førleikar 40 stig + uppgáva 10 stig = samlað meting á 83,3 stig. **Hesin mennarin gerst sostatt vinnari av útboðnum**.

## Krøv til tilboðið

Í tilboðnum skal vera upplýst:

- Navn og CV hjá mennara/-um.
- Navn og v-tal hjá fyritøku.
- Prísur pr. tíma uttan MVG.
- Lýsing av hvussu krøv til mennara/r, nevnd omanfyri, verða lokin.
- Prógv um at menningar-uppgávan er loyst:

  Veitarar ið ynskja at bjóða seg fram til hetta útboð, verða bidnir at venda sær til Talgildu Føroyar, at fáa nærri upplýsingar um, hvussu henda uppgáva skal loysast og hvørji prógv skulu veitast.
- Hvørjir viðkomandi kundar, mennarin/-ar hevur/hava havt og hvørjar viðkomandi uppgávur, mennarin/-arar hevur/hava loyst.

## Annað

Gjaldstovan tilskilar sær rætt, í samráð við tilboðsveitaran, at venda sær til aðrar kundar hjá mennaranum fyri at fáa ummæli.

Um Gjaldstovan og vinnarin av útboðnum ikki koma á mál við at gera sáttmála, so fær næstur í røðini møguleikan at gera sáttmála. Gjaldstovan tilskilar sær rætt til ikki at gera sáttmála við nakran tilboðsveitara, um tilboðini ikki eru mett at vera nøktandi.

## Tíðarfreistir og spurningar

Tilboð skulu latast inn umvegis teldupostin: talgildu@talgildu.fo, innan 17. august 2021, kl. 15. Miðað verður eftir at hava sáttmála undirskrivaðan í seinasta lagi 31. august 2021.

Eru spurningar til útboðstilfarið og uppgávuna, so ber til at venda sær til Heina Hátún á tel. 522353 ella skriva til teldupostadressuna heini@talgildu.fo. Allir spurningar skulu sendast inn skrivliga innan 10, august 2021, kl. 15. Allir spurningar verða kunngjørdir dulnevndir á Keypsportalinum.